# Vanlig sethús við óvanligari orku

**BERGHITI** Húsini á Liljuteigi 8 eru sum mong onnur hús í nýggja býlinginum her í Sandavági. Nýggj, snøgg og við einum øki, har ein enn ikki hevur gjørt alt rundanum. Men so heldur eisini øll samanbering uppat: Hetta er eitt av teim fyrstu sethúsunum her á landi sum fær hita úr jørðini. - Vit bæði eru ikki grønir forsprákarar, sum onkur kanska kann halda. Vit eru góð við umhvørvið, og kann ein samantvinna hetta við at spara pening til orku, so er nógv vunnið, sigur Jarnhold Nattestad

Snorri Brend

**Sandavágur:** - Okkara hús eru eini vanlig hús, í allar mátar. Men vit hava kortini lagt dent á, at tey skuldu gerast eftir øllum forskriftum og vera væl bjálvað, siga ungu hjúnini sum fluttu inn í nýggi sethús síni í apríl mánaði í fjør.

Tey bæði, Edith og Jarnhold Nattestad høvdu tó eitt ynski og ein dreym sum nú skuldi gerast veruleiki: Í fyrsta lagi at seta føtur undir egið borð. Men í øðrum lagi skuldu tey hitast upp við onkrum øðrum enn olju.

Tey kannaðu ymiskar møguleikar fyri orku, og komu so líðandi fram til, at berghiti var eitt gott alternativ.

- Eg havi ongatíð verið bangin fyri at royna okkurt nýtt og øðrvísi. So hetta var bara ein spennandi avbjóðing fyri meg, at kunna hita okkara hús upp við berghita, slær Jarnhold fast.

Tey fluttu inn í 150 fermetrar stóru sethúsini í apríl mánaði í fjør. Tey standa í nýggja býlinginum í Sandavági, nevndur "Í Sørpum".

- Her er fínt at búgva, staðfesta tey bæði Edith og Jarnhold, sum eiga børnini Kristina, Jónatan og Rebekka.

## Dýr olja

Áhugin hjá teimum báðum fyri hita og bjálving byrjaði fyri fýra árum síðani, meðan tey búðu í Noregi.

Tey arbeiddu her á eini av miðstøðunum hjá missiónsfelagsskapinum "Youth with á mission", her tey millum annað arbeiddu saman við kenda norska lovsangsleiðaranum, Jan Honningdal.

Tá tey fýra árini á norskari jørð nærkaðust endanum, byrjaðu hjúnini so smátt at tosa um heimkomuna - hvar tey skuldu búseta seg; hvussu húsini skuldu síggja út; hvat arbeiði tey kundu fáa; og ikki minst, hvussu skuldu komandi heim teirra hitast upp.

Hóast Edith er úr Havn og Jarnhold úr Miðvági avgjørdu tey at byggja norðarlaga í Sandavági. Umsókn varð send um grundøki og varð hon seinni játtað.

- Um hetta mundið var oljuprísurin í hæddini, og tað skundaði sjálvandi undir ætlanir okkara at velja okkum aðra orkukeldu, enn júst oljuna, greiðir Jarnhold frá.

Ein møguleiki, sum tey kendu úr Noregi vóru hitapumpur. Tey kannaðu møguleikan fyri hesi loysnini í Føroyum fyri fimm árum síðani, gjørdust tey bæði ikki sørt ovfarin.

- Vit spurdu okkum fyri hjá eini vælkendari hitafyritøku um møguleikan fyri at brúka eina hitapumpu í okkara nýggja heimi. Men so løgið tað enn kann ljóða, so vistu teir einki um hetta tá, greiðir Jarnhold frá.

Í dag er støðan sjálvandi øðrvísi, tí nú eru luft-til-luft hitapumpur at síggja í nógvum heimum kring landið.

## Tey fyrstu

Sum tann ídni og virkni - og annars ólærdi - maðurin sum Jarnhold er, gavst hann ikki á hondum, hóast hann ikki fekk svar uppá allar spurningar sínar.

At hann eftir heimkomuna fekk arbeiði hjá Leif Mohr í Havn, og nú sum søluleiðari í Sandavágs Timburhandli hevur bert økt um forvitni og áhuga hansara fyri hita, bjálving og orku.

Tá grundøkið varð fingið til vega, mátti avgerðin um hitaskipanina eisini takast. Hvørji aðrir møguleikar enn hitapumpa, oljufýring og líknandi, vóru til staðar.

Hjúnini í Sandavági vóru heppin, og komu við í eina roynd hjá Jarðfeingi, ið vildi kanna um til bar at hita hús upp í Føroyum við berghita.

- Hetta ljóðaði sera áhugavert. At so okkara hús gjørdust millum tey fyrstu sum fingu berghita, gjørdi bara tað heila uppaftur meiri spennandi, sigur Jarnhold brosandi.

## 700 krónur

Hetta við berghita var kortini ikki ókent fyri tey bæði. Tá tey vóru í Noregi, búðu tey eitt skifti í eini íbúð ið var hitað upp við berghita.

- Hetta tyktist vera ein góð og hóskandi loysn fyri okkum. Tá vit síðani fingu møguleikan at vera við í hesi ætlanini hjá Jarðfeingi, tóku vit sjálvandi av.

Í sambandi við útstykkingina av sethúsum teirra varð borað eitt 200 metrar djúpt hol, higar tvær slangur eru lagdar fyri at fáa hitan úr jørðini og inn í sethúsini.

Henda skipanin er rættiliga einføld, og snýr seg í stuttum, um at ein koyrir kulda niður í jørðina og tekur hitan innaftur, og brúkar hann víðari til upphiting av væl bjálvaðu og væl útluftaðu sethúsum teirra.

Og royndir teirra hava eisini verið góðar og hava svarað til vónirnar. Tey brúka 8000 krónur um árið til upphiting og brúksvatn, og góðar 7000 til el.

- Ja, elnýtslan hevur verið á góðum støði, og útreiðslurnar til vatn og hita liggja um 700 krónur um mánaðin. So tað er ikki so galið, sláa tey bæði, Edith og Jarnhold fast.



**UMHVØRVI**

*Hjúnini Edith og Jarnhold Nattestad vilja ikki lýsa seg sjálvi sum forsprákarar fyri tí grøna. - Vit eru góð við umhvørvið, siga tey bæði, sum í apríl mánaði í fjør fluttu inn í nýggj hús í Sandavági*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

snorri@sosialurin.fo